## Ukrainar spæla í Ukraina

Størsti parturin av leikarunum á ukrainska landsliðnum spæla fótbólt í heimlandinum. Av teimum 23 spælarunum, sum eru úttiknir, spæla heili 18 í heimligu kappingini í Ukraina. Stórfelagið Dynamo Kiev hevur seks landsliðsleikarar, meistaraliðið, Shaktar Donetsk, hevur fimm leikarar á landsliðnum, meðan Dnipro Dnipropetrovsk eisini hevur fimm. Tað vil siga, at bert fimm av landsliðsleikarunum spæla uttanfyri Ukraina. Av hesum spæla tveir í Russlandi, ein í Hollandi, meðan størstu stjørnurnar eru at finna í Chelsea og Leverkusen. Her er talan sjálvandi um áleypararnar Shevchenko og Voronin.

## Shevchenko vil vinna á Føroyum

Ringi standurin, sum vøllurin á Svangaskarði er í í løtuni, hevur órógvað fyrireikingarnar til dystin millum Føroyar og Ukreina leygardagin. Men heimsstjørnan á liðnum, Andriy Shevchenko sigur við útlendskar fjølmiðlar, at hann ikki hugsar um vøllin, men bara um dystin móti Føroyum:

– Vit hugsa ikki um dysturin verður spældur ella ikki. Vit venja tí vit vita, at vit ikki hava ráð at missa stig í Føroyum. Um vit spæla, so spæla vit fyri at vinna. Alt annað kemur í aðru røð, sigur Andriy Shevchenko, sum dagliga spælir í álopinum hjá ensku meistarunum Chelsea.



# – Mugu standa rætt og berjast fyri sakini

**Súni Olsen, Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum eru allir við aftur í hópinum, so uppgávan hjá Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjara, at seta liðið, er hugaligari enn hon kanska nakrantíð hevur verið.**
**– Óvissan um vøllin hevur órógvað fyrireikingarnar, sigur landsliðsvenjarin, ið lýsir Ukreina sum eitt sterkt og støðugt lið**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*- Vit møta Ukreina, sum er eitt av teimum heilt góðu liðunum á verðinsplan. Tað er eitt lið, sum ikki hevur teir stóru útsvingningarnar og spæla næstan maskinfótbólt, sigur Jógvan Martin Olsen*

Landsliðið hevur verið savnað í tríggjar dagar nú. Til í gjárkvøldið klokkan sjey valdaði framvegis óvissa, um dysturin móti Ukreina skuldi spælast ella ikki.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað hevur órógvað fyrireikingarnar. Áðrenn vit savnaðust var tað óvist við vøllinum og tað var tað til í kvøld (hóskvøldið, blðm.), sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Nú er so avgjørt, at dysturin skal spælast. Vøllurin er vátur, bleytur, tungur, og tá liðini hava vant á honum áðrenn dystin skal roknast við, at vøllurin helst verður óslættur eisini.

Kann hetta kanska vera ein fyrimunur hjá Føroyum?

– Tað trúgvi eg ikki upp á nakran sum helst máta. Tað vísir seg at slættari vøllurin er, betri er tað fyri okkum, tá so nógvir av okkara spælarum spæla á kunstgrasi vanligt, sigur Jógvan Martin Olsen.

– Eg trúgvi ikki, at hinir verða so ávirkaðir av vøllinum, tí venjingarvallirnir hjá teimum eru ofta nokkso óslættir, vísir Jógvan Martin Olsen á.

### Millum 10 tey bestu

Ukreina sum vit møta leygardagin, telist millum tíggju tey bestu londini í heiminum, sambært styrkilistanum hjá FIFA. Hvørjum kunnu vit rokna við?

– Tað er ringt at siga. Vit møta Ukreina, sum er eitt av teimum heilt góðu liðunum á verðinsplan. Tað er eitt lið, sum ikki hevur teir stóru útsvingningarnar og spæla næstan maskinfótbólt, sigur Jógvan Martin Olsen, ið lýsir Ukreina sum eitt lið, sum disiplinerað, tekniskt væl fyri, hart arbeiðandi og fysiskt sterkt .

– So tað verður ikki ein lættur dystur, metir Jógvan Martin Olsen.

### Súni, Jón Rói og Andrew

Sambært landsliðsvenjaranum er fortreytin fyri einum góðum úrsliti, at vit standa væl á vøllinum og berjast fyri sakini, tá vøllurin ikki leggur upp til fótbóltsspæl. Til hesa uppgávu sær landsliðið nakað væl sterkari út, enn tað hevur gjørt í langa tíð.

– Har eru onkur ivamál, men vit hava Súna, Jón Róa og Andrew aftur. Teir vóru als ikki aktuellir til nakran dyst í fjør, men eru nú við aftur við teirra royndum og rutinu, sum eg vóni kann geva liðnum nakað, sigur landsliðsvenjarin og viðgongur, at hansara uppgáva er hugaligari nú enn hon hevur verið í longri tíð.

# Veðrið størsta mótstøðan hjá Ukreina

**Ringa veðrið í Føroyum verður tað, sum Ukreina fær størstar trupulleikar av, tá Shevchenko, Voronin, Rebrov og restin av ukreinska hópinum koma á Svangaskarð í morgin, meta útlendskir fjølmiðlar**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Veðrið kann verða harðasta mótstøðan hjá Ukreina, skrivar journalisturin Igor Linnyk úr Kiev.

Jú, útlendskir fjølmiðlar gera nógv burturúr kavanum, sum hevur ligið á Svangaskarði seinastu dagarnar og skapt óvissu um, hvørt dysturin millum Føroyar og Ukreina skuldu spælast ella ikki.

Føroyar bóðu eisini UEFA um at flyta dystin til seinni í ár. Ein flyting av dystinum var treytað av eini samtykt frá øllum hinum londunum í bólkinum, og tað fingu Føroyar eisini. Men í gjárkvøldið var ein umboðsmaður frá UEFA í Føroyum og hugdi at vøllinum á Svangaskarði. Hesin umboðsmaður metti, at spælararnir ikki tóku skaða av at spæla á váta og bleyta vøllinum, og tískil staðfesti hann, at EM-undankappingardysturin millum Føroyar og Ukreina skal spælast til ásettan dag og tíð.

– Eg hevði verið fegin, um dysturin varð útsettur, hevur Oleg Blokhin, venjarin hjá Ukreina, sagt við útlendskar fjølmiðlar í gjár, ið helst er skuffaður av avgerðini hjá UEFA-umboðsmanninum.

– Tað ringasta hjá okkum vildi verið, um vit fóru har (til Føroya, blðm.) og komu á vøllin, og dómarin síðani avgjørdi, at dysturin ikki skal spælast, sigur Oleg Blokhin.

### Timburmenn og postmenn

Tað er ikki so nógv annars, sum útlendsku fjølmiðlarnir gera burtur úr dystinum millum Føroyar og Ukreina. Í okkara bólki eru tað sum vera man Frankaríki og Italia, ið eyguni eru vend ímóti. Og í upptaktini til komandi dystirnar hjá Frankaríki, sigur Paul Marshall hjá Soccernet soleiðis um Føroyar:

– Tað, sum Domenech (franski landsliðsvenjarin, *blðm.*) hevur lært, av sigrinum á timburmonnunum og postmonnunum í Føroyum - burtursæð frá nøkrum “do-it-yourself” tippum og eina holla vitan til postverkið í einum fjarskotnum Norðurlendskum oyggjabólki - kundi hann allarhelst skrivað á baksíðuna á einum av føroysku frímerkjunum.

*Blokhin (v.m) skal stýra heimsstjørnuni Shevchenko og restini av ukreinska liðnum frá síðulinjuni*
*Mynd: Polfoto*



**EM 2008 - Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skotland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 9 | 3 | 6 | 9 |
| 2 Frakland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 11 | 2 | 9 | 9 |
| 3 Italia | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 4 Ukraina | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 6 |
| 5 Litava | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 6 Georgia | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 3 |
| 7 Føroyar | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 0 | 18 | -18 | 0 |